# kk til ein stóran sjónleik



journalistinum ikki skínur ígjøgnum í arbeiðnum, hann ger. Eg haldi, at hetta er ein trupulleiki hjá fjølmiðlunum í Føroyum. Eitt gott dømi um hetta var journalistiska viðgerðin av 266b í vetur, tá fjølmiðlarnir eftir mínum tykki týðiliga valdu síðu. Eitt annað dømi er formansvalið hjá Sambandsflokkinum í fjør, tá stríðsval var millum meg og Kaj Leo Johannesen. Tá valdi blaðstjórin á Dimmalætting bæði í skrivt og talu heilt greitt síðu.

Eg haldi eisini at tey, sum starvast innan fjølmiðlarnar og IKKI hava journalistiska útbúgving, mugu vera "undir neyvum eftirliti" av redaktiónini. Hetta kemst av, at fleiri av hesum fjølmiðlafólkum ikki kenna, hvar markið gongur fyri, hvat tú kann, og hvat tú ikki kann skriva um fólk.

*Heldur tú, at føroyskir journalistar fara nóg tætt at tykkum politikarum?*

Sjálvsagt skulu journalistar vera kritiskir og stilla kritiskar spurningar – tað er teirra uppgáva. Føroyskur journalistikkur er ikki sørt merktur av sensatiónsjournalistikki. Tilfarið hjá bløðum og loftmiðlum byggir nógv á smálutir og á smáborgarligheit, - hvat hesin og hin gera, hvat tey siga ella ikki siga.

Nú eri eg ein av teimum politikarum sum veruliga kent á egnan kropp at hava ein journalistiskan "shark" tætt at mær. Eftir at hava verið drigin gjøgnum fjølmiðlamaskinuna kann eg bara staðfesta, at tað sum varð skrivað og gitt var ómetaliga illa undirbygt, kannað og eftirkannað. Ja, har vantaði snøgt sagt dygd og dýpd. Eftir eg varð hálshøgdur, doyði málið. Eingin kritisk uppfylging. Hetta kom ivaleyst av, at tá "seldi" málið ikki longur.

Eg havi sum so einki ímóti, at journalistar koma tætt at mínum privata og vinnuliga lívi, men tá má eg eisini krevja, at arbeiðið verður gjørt ordiliga - og ikki tað svansið, sum eg upplivdi.

Svarið til spurningin hjá tær er tískil – Jú, víst hava slíkar journalistar, men teir mugu eisini vera seriøsir og sýna góðan fjølmiðlasið.

*Fleiri vilja vera við, at søgurnar í fjølmiðlunum – eisini teimum føroysku - byggja á nógv tilvildarlig stríðsmál, tí í hesum søgum fáa lesarin og hyggjaran mest drama. Ber tað til at kalla politikk fyri ein sjónleik í miðlunum?*

Ja, tað er tíverri so. Eg haldi, at tað er stórt spell, tí virðingin fyri bæði politikkinum og løgtinginum tekur skaða av tí, sum vit ofta síggja gongur fyri seg bæði í tinginum og fjølmiðlunum. Síðan sjónvarpið er fara at varpa út frá løgtingsfundum, eru løgtingsfundirnir blivnir til ein sjónleik frá kl. 13.30 til uml. 17.00 .

Tá sjónvarpingin í løgtinginum steðgar, fara politikarar at bera seg at sum vanligt, og løgtingslimir taka ikki orðið meir enn neyðugt er. Tað er spell, at tað ikki ber til at geva lurtarum og hyggjarum møguleikan at síggja tað veruliga politiska arbeiðið - tað seriøsa arbeiðið, sum er í teimum ymsu løgtingsnevndunum, - men bara sjónleikin í miðlunum.

Eg haldi, at sjónleikurin í miðlunum skaðar meira enn hann gagnar áhuganum fyri politikki, og gevur eina mynd av politikarunum sum óseriøsar. Hetta er harmiligt, tí flestu politikarar taka sítt arbeiði í størsta álvara og gera eitt gott arbeiði.

## Spunasmiður ikki gera politikk

*Kann tað hugsast at Johan Dahl fer at fáa sær eitt samskiftisfólk ella spunasmið í framtíðini?*

Tað vænti eg ikki, at eg fari at fáa mær. Tað er alt ov kostnaðarmikið at hava samskiftisfólk, men tað er møguligt, at eg fari at keypa mær ávísa ráðgeving, um eg haldi, at tørvur er á tí.

*Eru tað fjølmiðlarnir, politikararnir ella spunasmiðirnir, sum seta dagsskránna í Føroyum?*

Sum áður nevnt hava fjølmiðlarnir stóra ávirkan á dagsskránna. Hetta fer óivað at hava við sær, at flokkarnir seta sonevndar spunasmiðir fyri at vegleiða seg , hvussu flokkurin og politikkarin skulu "bera seg at" í teimum ymsu málunum.

Eg haldi, at tað stóra valdið, sum fjølmiðlarnir hava, trýstir politikarar at fáa proffessionella hjálp frá spunasmiðum .

Ein samrøða er jú eitt "maktspæl" millum spyrjara og svarara, og har hevur spyrjarin tey "góðu" kortini í hondini. Hetta trýstur svararan – okkum politikarar - til at vera fyrireikaðar, og harvið eisini at fáa vent spurninum til okkara fyrimun.

Vit síggja spunasmiðir í politisku skipanini longu í dag, - og har vil eg siga, at tað er umráðandi, at tað ikki er spunasmiðurin og embætismaðurin, sum seta politikkin út í kortið, men politikarin. Spunasmiðurin og embætismaðurin skulu arbeiða sum ráðgevar/vegleiðarar til tann politikk, sum verður settur út í kortið.Tað kann vera trupult at fyribyrgja, at spunasmiðurin ikki orðar politikkin eisini. Her er spurningurin, hvussu málrættaður og væl fyrireikaður flokkurin er í sínum stevnumiðum, og hvussu dugnaligir og sjálvstøðugir politikkararnir eru.

*Væntar tú, at vit fara at síggja fleiri samskiftisfólk í føstum starvi í fakfeløgi, vinnulívi og politisku skipanini( flokkar og aðalráð) í framtíðini?*

Ja, tað fara vit. Vit síggja hetta rák týðiliga í dag. Bæði aðalráð, politiskir flokkar, fakfeløg og bankar hava sett samskiftisfólk í starv, og tað fer at gerast alt meira vanligt, at hesir bólkar fara at styrkja seg við samskiftisfólkum. Eg eri eisini av teirri áskoðan, at tað er neyðugt, tí tað forðar fjølmiðlunum at gera søgur, sum einki hald hava í veruleikanum. Hinvegin mugu vit eisini vera á varðhaldi, tí henda broyting ger, at nógv "objektiv tíðindi" verða broytt til propaganda-søgur til fyrimunar fyri bankar, flokkar, aðalráð og fakfeløg.

## Greinarøð

Politikkur gongur meira enn nakrantíð fyri seg í fjølmiðlunum. Vil ein politikari gera vart við seg, sleppur hann ikki undan at nýta fjølmiðlarnar sum sýnisglugga, tí í fjølmiðlunum hittir politikarin flestu av sínum veljarum. Hetta er bakgrundin fyri spinn og spunasmiðum. Meðan hugtakið spinn og spunasmiðir framvegis er rættiliga nýtt í føroyskum høpi, so hevur stór orka verið nýtt til í lýsa og skilja virksemi hjá spunasmiðum í londunum uttanfyri Føroyar. Sosialurin fer komandi vikurnar at taka pulsin við at varpa ljós á samskiftið millum politikarar og fjølmiðlar í Føroyum.